


# Búskaparfrøðingur [endurlýsing]

Tórshavnar kommuna søkir eftir búskaparfrøðingi til spennandi starv á roknskapardeildini.

**Uppgávur**
Sum búskaparfrøðingur ráðgevur tú stovns- og deildarleiðarum í búskapar- og fíggjarspurningum. Tú er við til uppseting av fíggjarætlanum, roknskapum og ávegis uppgerðum. Eisini er tú við til at loysa minni og størri projektuppgávur.

Harumframt ert tú við til at menna og røkja búskaparskipanina, sum byggir á Microsoft Dynamics (Navision).

Tórshavnar kommuna bjóðar tær eitt starv í einum spennandi og dynamiskum umhvørvi, við sjálvstøðugum uppgávum, ið geva tær góðar møguleikar fyri fakligari og persónligar menning.

**Setanin**
Vit rokna við at tú hevur viðkomandi búskaparliga útbúgving sum t.d. HA, HD ella Cand. Merc.

Starvið verður lønt eftir útbúgving og royndum sambært sáttmálanum við avvarðandi yrkisfelag.

**Upplýsingar um starvið**
Fleiri upplýsingar fært tú við at ringja til Hera Olsen, roknskaparleiðara ella Janus Isfeldt deildarleiðara á telefon 302010.

**Umsóknarfreist**
Umsókn við viðmælum og prógvum skal sendast til Tórshavnar kommunu, postboks 32, 100 Tórshavn og vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. juni 2007.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**



# Málsviðgeri [endurlýsing]

Søkt verður eftir málsviðgera til heilsu- og umhvørvisdeildina hjá Tórshavnar kommunu. Viðkomandi, sum settur verður í starvið, skal taka sær av heilsu- og umhvørvismálum í kommununi.

**Bygnaður og starv**
Heilsu- og umhvørvisdeildin er ein undirdeild hjá tekninsku deild við tilvísing til býarverkfrøðingin, sum er deildarleiðari. Á heilsu- og umhvørvisdeildini arbeiða tvey starvsfólk, sum burturav taka sær av heilsu- og umhvørvismálum. Starvið snýr seg í høvuðsheitum um málsviðgerð, eftirlit við virkjum og samskifti við borgarar.

**Førleikakrøv**
Hægri útbúgving innan umhvørvi, lívfrøði ella annað. Góðan kunnleika til EDV og skal duga væl at samskifta á føroyskum máli.

**Royndir**
Til starvið er umráðandi, at umsøkjarin hevur royndir innan arbeiðið við heilsu- og umhvørvismálum og innan almenna fyrisiting.

**Persónligir eginleikar**
Dentur verður lagdur á, at tú skalt:
- vera fyrikomandi, duga væl at arbeiða sjálvstøðugt og hugsa skynsamt
- Virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og onnur sum arbeiða hjá kommununi

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Boða Haraldson, býarverkfrøðing, ella Anniku Berg, verkfrøðing, á tlf. 302010.

**Umsókn**
Umsókn saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum skal sendast til Tórshavnar kommunu í seinasta lagi mánadagin 25. juni 2007. Merkjast skal á brævbjálvan: „Málsviðgeri til Heilsu- og umhvørvisdeildina".

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**

# Nólsoyar skúli

Søkt verður eftir tveimum lærarum til Nólsoyar skúla, tíðaravmarkað skúlaárið 2007/08.

Um tú hevur hug til eitt avbjóðandi starv, sum krevur hugflog, so er hetta starvið akkurat títt.
Um tær dámar tætt samstarv við arbeiðsfelagar, so er hetta starvið akkurat títt.
Um tær dámar annaleiðis undirvísingargongdir, so er hetta starvið akkurat títt.

**Vit hava brúk fyri :**
- Einum lærara í tíðaravmarkað sáttmálasett starv fulla tíð (uml. 26t/v)
- Einum lærara í tíðaravmarkað sáttmálasett starv (fyribils uml. 16 t/v – endaligt tímatal er ikki játtað enn)

Vit hava brúk fyri lærarum, sum kunnu átaka sær undirvísing í:

- Byrjunnarundirundirvísing (føroyskum, heimstaðarlæru, H og L)
- Føroyskum (4. – 9. flokk)
- Donskum (4. – 9. flokk)
- Enskum (4. – 9.Flokk)
- Týskum (8. – 9.fl.)
- Sertímum/stuðulstímum
- Bókasavnstímum

Nólsoyar skúli er lítil bygdaskúli við 30 næmingum komandi skúlaár. Næmingarnir frá 1. til 9. skúlaár eru flokkaðir í tríggjar eindir.

Vit leggja stóran dent á trivnað og gott, tryggt arbeiðsumhvørvið fyri børn og vaksin.

Ferðasambandið til Havnar er gott.
Møguleikar eru fyri at fáa bústað í Nólsoy.
Vit hava nýggjan dagstovn uttan bíðitíð.

So lat okkum hoyra frá tykkum, sum hava hug til eitt avbjóðandi starv.

Størvini verða lønt í lønarflokkunum 18.1 – 27.4 sambart avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

Umsóknir við avriti av prógvið, cv og viðmælum skulu verða skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi 20. juni 2007.

**Nærri fæst at vita um størvini frá :**
Gunnvør Joensen, skúlaleiðara
tlf 302466 ella 302465.
gunnvoer.joensen@skulin.fo

# STARV

Sp/f Heimabakaríið søkir eftir tilkomnum fólki at byrja at arbeiða í bakarahandlinum hjá okkum í Sverrisgøtu 7,

Arbeiðstíðirnar eru mánadag til fríggjadag og eftir avtalu.

Vekur hetta tín áhuga, so kanst tú ringja til Jóhannes og fáa meira at vita á tlf: 232660.